Ynskja tygum at koma í samband við Tórs    havnar Golfklubba kunnu tygum senda ein teldupost til golf@golf.fo.

Tórshavnar Golfklubbi varð stovnaður í 1989 og er fyribils einasti av sínum slagi í Føroyum. Golfklubbin er limur í ÍSF. Enn er bert spælandi á 9 holum á lendinum hjá bóndanum úti á Glyvursnesi, men um stutta tíð verður farið undir at byggja eina 18 hols golfbreyt í Suðurstreymi. Henda breyt kemur at lúka øll altjóða krøv.

Í dag eru umleið 150 limir í Tórshavnar Golfklubba, og áhugin fyri hesi ítróttargrein er eisini so stórur her í Føroyum, at væntandi verða vit eini 5 – 600 limir, tá nýggja breytin er veruleiki.

Umframt at verða til gleði fyri limirnar, er nýggja breytin eisini við til at gera Føroyar meira áhugaverdar sum ferðamannaland, tí tað er ein sannroynd, at golfítróttin er skjótast veksandi ítróttargreinin í heiminum í dag.